

## Búskaparráðið verið virkið hóast broytingartíð

Fíggjarmálaráðið vísir nú aftur, at Búskaparráðið hevur verið óvirkið síðan Jørn Astrup Hansen alment segði formanssessin frá sær í november í fjør,soleiðis sum Sosialurin skrivaði fríggjadagin. Í Sosialinum nr. 120 á síðu 7 stendur millum annað soleiðis um Búskaparráðið: »Meðan fíggjarkreppan hevur herjað kring heimin og í Føroyum, hevur einasti óhefti ráðgevandi myndugleiki hjá Fíggjarmálaráðnum, Búskaparráðið, verið uttan formann”.....”Síðan tá hevur Búskaparráðið verið meira ella minni óvirkið. Sjey mánaðir eftir at formaðurin legði frá sær, hevur landsstýrismaðurin valt eitt nýtt Búskaparráð.« Hetta er tó ikki rætt, staðfestir Mortan Simonsen, og greiðir soleiðis frá: »Bæði formaðurin í Búskaparráðnum, Jørn Astrup Hansen, og restin av ráðnum játtaðu at halda fram eftir 31. desember 2008 til nýggja lógin um Búskaparráð varð samtykt í Løgtinginum. Nýggja lógin um Búskaparráð (Løgtingslóg nr. 50) varð samtykt í Løgtinginum 11. mai í ár. Jørn Astrup Hansen og restin av Búskaparráðnum hevur tí mannað Búskaparráðið og fingið mánaðarliga samsýning fyri hetta til 1. juni í ár.« Nýggja Búskaparráðið tekur við tann 1. Juli.

**- rn.**

# yum



*nstanandi StatoilHydrofólk*

*Mynd Jan Müller*

sum eitt týðandi framtíðar leitiøki fyri fyritøkuna. Og her liggur føroyski landgrunnurin frammaliga. Her er sjálvandi talan um høgan váða, men møguleiki er afturfyri eisini at gera stór fund.

### Fegnir um føroying í leiðslu

Vit spurdu at enda hvønn týdning tað hevur fyri StatoilHydro, at har eisini finst ein føroyingar ovarliga í leiðsluskipanini, nevniliga Rúni M. Hansen, sum stendur á odda fyri leiting í Norðurafrika og Norðureuropa!

- Vit leggja okkum eftir at hava lokal fólk, har vit arbeiða. Og tí fegnast vit um at hava Rúna M. Hansen við í okkara arbeiði. Hann hevur so víst, at hann hevur dugað at handfarið hetta at bora brunnar. Tað boriarbeiði, sum er gjørt í Føroyum higartil, hevur verið gjørt við sera hepnari hond. At vit ikki hava funnið olju er so nakað annað. Tað er tað vit nú fara eftir í komandi brunni.





*Harrier Explorer, sum nú skjýtur seismikk fyri StatoilHydro á føroyska landgrunninum*





*Talan er um eina rættiliga umfatandi kanning, har seismikkur verður skotin á einum stórum øki*